# Uttan fyri Garðar í Hoyvík

Tann 1. august var ættarmót í Hoyvík.

Nú er Hoyvík á odda í so mongum, eitt nú í barnatali, men í túsund ár var bert eitt hús í bygdini, sjálvur garðurin mitt í bønum við víkina.

Í 1835 komu eini hús afturat. Eins og so mangir hoyvíkingar í dag komu tey aðrastaðni frá. Maðurin var Símun, traðarmannasonur av Glyvrum, og húsmóðirin var Charlotta, dóttir leigulendingin á Geilargarði Úti við Á í Kaldbak. Tey fingu fýra børn. So doyði Lotta. Símun giftist uppaftur við Johonnu, sum var fødd í Forna á Nesi, og tey fingu tvey børn. Tað vóru um 300 av eftirkomarum hjá hesum niðursetufólkum, sum møttust síðsta leygardag.

Fyrst á skránni var samkoma í Havnar kirkju, har Marjun Simonsen, dóttir Esbern bankastjóran, sum var langabbasonur Símun, helt fróðarfyrilestur um lív og ævi Símunar. Hon legði fram eina frálíka enska týðing av fyrilestrinum, og tað kom væl við hjá teimum eftirkomarum, sum ikki skiltu føroyskt. Hesir vóru komnir úr Noreg, Danmørk, Onglandi og USA. Eitt, sum Marjun vísti á, var at Símun hevði goldið rættiliga nógv fyri sessin hjá húskinum í hesi kirkju, har hann kom oman til gongu hvønn sunnudag. Ein av eftirkomarunum, Jóhan hjá Esbern Simonsen í Saltangará, hevði áhugaverda framløgu um hesa gomlu kirkju.

## Vitjan á kirkjugarðinum

Síðan gekk leiðin út á kirkjugarðin á Svínaryggi, har øll av teimum fyrstu ættarliðunum eru grivin. Har segði Julianna Klett, langabbadóttir Símun, nøkur góð orð, og var hetta ein sera hugfarslig løta, har vit sóu nógvar av teimum gravsteinum, sum Óli Jacobsen hevur skrivað so hugvekjandi um.

Á middegi vóru vit í Studentaskúlanum, har Óli Simonsen greiddi frá tí tilfari, sum Sverri Joensen hevur funnið fram til um ættina og lagt fram í bók síni um Høgaból. Haðani gekk leiðin niðan á Hamarin, har ein minnispláta varð avdúkað um Símun og báðar konur hansara. Sigurd Simonsen, sum framvegis er virkin í ferðamannavinnuni sum stjóri á fyritøkuni Hoyviking Tours, hevði mergjaða røðu um langabba sín, og helt hann hana eisini á enskum. Myndatøka fór fram við flaggstongina í Hoydølum, har torvheiðar vóru í 1835 og haðani klyvjarossini fóru niðan gjøgnum Hoydalsbrekkuna um Rossaliðið, sum Símun hevði gjørt í tann seyðahøga garðin, hann lagaði um alla trøðna eins og allan tann gamla bøin í Hoyvík.



Julianna greiðir frá ættini í gamla kirkjugarði í Havn



Hetta er partur av ættini, sum var til staðar

## Óført borðhald

Gestirnir fingu síðan høvi til at støkka inn á gólvið í húsunum hjá skyldfólkum, ið búgva á trøðni Uttan fyri Garðar, og har bar til at hitta mong.

Um kvøldið var óført borðhald í studentaskúlaaulini við røðum og sangi, sum Sigrið Sivertsen hjá Magnusi, sum er sonur Jógvan hjá Símun og Johannu á Høgabóli, skipaði so væl fyri. Har varð eisini framløga av einum prentaðum bóklingi við yvirliti yvir alla hesa fjølbroyttu ætt, sum Eydna Fosaa hevur greitt hegnisliga úr hondum.

Aftaná var góður føroyskur og enskur dansur, og semja var um, at tey, sum høvdu verið í fyrireikingarnevndini, Símun Mittún, Eydna Fosaa, Annleyg Patursson, Julianna Klett, Hans Simonsen og Hannelena Mittún, høvdu gjørt eitt vala verk og høvdu mikla tøkk uppiborna fyri tað, tey høvdu útint.

**Zakarias Wang**
**skyldmaður**

# Trý og 68 ára gomlu Mathias á Slættaratindi



*Í góðveðrinum stutt fyri ólavsøku vóru nógv fólk uppi á Slættaratindi. Millum tey mongu, ung sum gomul, var bert trý ára gamli Mathias úr Kollafirði. Saman við 68 ára gamla langabbanum, sum eisini eitur Mathias, fóru teir báðir til gongu klokkan hálvgun eitt, og tveir tímar seinni stóðu báðir uppi á hægsta tindi. Lítli Mathias varð trý ár mikudagin fyri ólavsøku.*



## Prógv

26. juni tók Daniel Shelley, sonur Eyðgerð og Philip Shelley, prógv sum Bachelor of Arts, á Institute at Bournemouth í Onglandi.